

# Sosialurin

# VARPIÐ

Canal+ • Sunnudagin kl. 19.00

## Lassie

Tá Carradough-húskið kemur í fíggjarligar trupulleikar, noyðast tey at selja teirra elskaða Lassie, sum ístaðin fer til Skotlands. Lassie sjálvur vil tó sleppa heim, og so byrjar ein long og vandamikil ferð.

Kanal4
Leygardagin kl. 23.00

## Et liv som albino

Gjøgnum søguna eru albinofólk løgd undir at hava gandakendar kreftir og at hava serliga tætt samband við gudarnar. Og eisini verður sagt, at tey heilt einfalt eru ónd og huldukend.

TV3
Hósdagin kl. 20.00

## Diana: Vitnini í tunlinum

Klokkan 12.23 tann 31. august 1997 endi ein svartur Mercedes í eina betonsúlu í einum tunli í Paris. Diana, Dodi Fayed og bilførarin, Henri Paul, lótu lív. Innan hálvan tíma var tunnilin rokaður við paparazzi, løgreglu, fótgangarum og portørum, sum øll royndu at sleppa framat. Her verður sagt frá, hvat hendi eftir vanlukkuna. Hvør var á staðnum og hvør skeldaðist og bardist um hvat. Eisini verður tosað um, hví myndamenn vórðu handtiknir og hvat seinni hendi við myndunum, sum vórðu tiknar.

FRÍGGJADAGUR 24. AUGUST 2007

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra •